UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Umhvørvisstovan
Traðagøta 38
Postboks 2048
165 Argir
Føroyar

Tórshavn, tann 2. desember 2019
J.nr.: 19/00558-4
At tilskila í svari
Viðgjørt: khp
Tygara skriv:

**Att: Arnhold Thomassen**

**Útnevning av útskiftingarformanni**

Eftir § 8 í lóg nr. 147 frá 27. mars 1939 um útskifting, sum broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, verða tygum hervið tilnevndur at taka yvir sum útskiftingarformaður eftir Petur Nielsen í hesum málum.

Uttangarðsútskiftingar:

- Uppsalahagi, Klaksvík
- Líðarhagi, Mykines
- Syðriseyður, Sandavágur

Innangarðsútskiftingar:

- Depil fyri Norðan
- Haraldssund

Somuleiðis verður tú biðum um at halda fram sum formaður í útskiftingarmálinum í Kvívík.

Teir nevndarlimir, sum ikki fyrr hava røkt útskiftingarstarv, skulu skriva undir váttan undir trúnaðartreytum, sum fyrisettar av landsstýrinum.

Skilað verður til, at eftir § 18 í útskiftingarlógini, so skulu útskiftingarúrslitini verða ført í bók, sum landsstýrið løggildir.

Eftir § 22 í útskiftingarlógini kann kommunan í sambandi við útskiftingina taka ein ávísan prosentpart av jørðini til almenna nýtslu. Til tess at sleppa undan óneyðugum arbeiði og kostnaði, skal útskiftingarnevndin biðja kommununa taka støðu til møguliga ognartøku.

Avrit er sent Sorinskrivaranum og Petur Nielsen.

Vegna Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri